# Menniskjað og myndahøggarin Hans Pauli Olsen

Í hansara list er menniskjað miðpunktið í tilveruni, lívinum, kroppinum, kenslunum, sálini, lívsroyndunum og lagnuni. Hans Pauli avmyndar menniskjuni, sum hann sær tey. Tann nakni mannakroppurin er eitt vakurt landslag, skapt av Guds hond. Vit koma nakin til verðina og fara nakin aftur í kistuna. Hans Pauli blandar naturalistiska impressionismu við modernistisk avantgardistisk hugskot og henda blandin er sera áhugaverd og original



*Listamaðurin og barnið*

LIST
*Øssur Johannesen*

Teir tríggir Olsen brøðurnir, Torbjørn, sum er málari, Marius, sum er grafikari, og Hans Pauli, sum er myndahøggari, teljast allir millum tey størstu listafólkini, vit hava havt í Føroyum. Gud viti hvør ella hvat tað er, sum hevur givið hesum beiggjunum stór listarlig evnir í dópsgávu, sum kemur at ríka okkum føroyingar møguliga til allar tíðir. Og hvussu nógv fáa Torbjørn, Hans Pauli og Marius á føroysku fíggjarlógini, ella á fíggjarlógini hjá Tórshavnar kommunu? Ikki eitt oyra. Okey, Tórshavnar kommuna hevur reist fleiri standmyndir hjá Hans Paula og tøkk fái teir fyri tað.

Men tey flestu stóru listafólkini, skaldini, tónleikararnir og sjónleikararnir eru blóðfátøk og tað líkist svartasta ongum. Listin, skaldskapurin, tónleikurin, sjónleikurin eru hjartað, sálin og heilin í samfelagnum. Tað er tað einasta, sum hevur varandi virði í samfelagnum. Politikarar, brúkið meiri pengar uppá list, skaldskap, tónleik, sjónleik. Tað eru nógvir pengar í mentan, brúkið 500 milliónir krónur uppá mentan um árið. Takk! Heldur tað enn at brúka 100 tals milliónir uppá eitt ljótt fótbóltsstadion. Tórbjørn segði, at fótbóltur er tann býttasta religiónin, sum er til í verðini. Tóroddur segði fótbóltur, hasi rópini har, hatta er fasisma, tað skuldi verið forboðið. Fótbóltur er platt undirhald, fótbóltsspælararnir eru líka stór nullir sum bóltarnir, teir renna eftir. Teir flestu føroyingar eru blindir, fylla seg við undirhaldi, plattum undirhaldspoppi og countrymusikki, fótbólti, sjónvarpi, bingo og øðrum líkasælum innihaldsleysum tómum undirhaldi.

Torbjørn Jacobsen er tann einasti mentamálaráðharrin, sum hevur gjørt ein innsats fyri mentanina í Føroyum, og hann bleiv sjálvandi noyddur at fara frá.

### Menniskjað miðpunktið

Ná, aftur til Hans Paula. Í hansara list er menniskjað miðpunktið í tilveruni, lívinum, kroppinum, kenslunum, sálini, lívsroyndunum, lagnuni osfr. Hans Pauli avmyndar menniskjuni, sum hann sær tey. At fáa tað at líkjast er ongin trupulleiki, og Hans Pauli avmyndar fólkini nakin sum oftast. Tann nakni mannakroppurin er eitt vakurt landslag, skapt av Guds hond. Vit koma nakin til verðina og fara nakin aftur í kistuna. Hans Pauli blandar naturalistiska impressionismu við modernistisk avantgardistisk hugskot og henda blandin er sera áhugaverd og original.

Sum handverkari er hann eins og Torbjørn og Marius sera virtuosur tekniskt. Vit síggja eina standmynd av konuni Hjørdis Haack, sum eisini er eitt stórt listafólk. Hon er sum kvinna guddommiliga vøkur og at Hans Pauli hevur sterkar kenslur fyri henni, sæst alt fyri eitt. Hjørdis er paradísið hjá Hans Paula, í kærleikanum, sálini, hjartanum og sjálvandi eisini sexuelt. Hjørdis hyggur við sínum vakra eygnabrái út í verðina, hon søkir tað poetiska, tað vakra í lívinum og tilveruni, og ignorerar tað myrka og ljóta. Tað geri eg ikki. Aftan fyri hana er eitt leirfjall. Hetta kann vera eitt symbol uppá kærleikan millum tey bæði, so sterkur sum kletturin eftir øllum at døma, og so síggja vit profilin hjá Hans Paula álvarsamur og sterkur, sum ein skuggi, og Hjørdis følir seg varda. Skuggaprofilurin hjá Hans Paula og umvent kompositiónin er eisini sera einføld og sannførandi.



*Konan avmyndað*

### Avdúkar seg sjálvan

Spegilsmynd kallast ein stór standmynd. Vit síggja eina kvinnu, sum er upp á vegin, andlitsbráið er álvarsamt, sum hon óttast fyri at seta eitt nýtt lív í okkara verð, sum upp á mangar mátar er alt ov ónd. Hvat fyri lagnu hetta barnið fær, vita vit ikki, ljóta ella góða. Vit síggja hennara spegil, sum symboliserar undirgang og so fjallið. Men ein vanlig kvinna føðir eftir 9 mánaðir, meðan henda kvinna aldrin føðir, men verður verandi tjúkk og verður standandi, eisini langt eftir bæði modellin og listamaðurin eru farin úr hesi verð.

Sum áður nevnt er mannakroppurin eitt meistaraverk skapt av Guds hond. Kroppurin er húð, bein og væta. Nógv listafólk hava ígjøgnum allar tíðir avmyndað menniskjakroppin, kenslurnar, sálina, tankarnar, upplivingarnar og lívsroyndirnar, og eisini Hans Pauli.

Vit síggja eina sjálvsmynd í leiri og sum tann fyrsti listamaðurin í Føroyum torir Hans Pauli at avdúka seg fullkomiliga naknan sum Skaparin hevur skapt hann við berum murti og øllum. Andlitsbráið er eitt sindur óhugnaligt og makaburt. Hann dyrkar seg sjálvan, er upptikin av síni egnu listaverð, í hondini hevur hann tveir leirklumpar. Vit fara øll í eina kistu niður í moldina at búgva, men trø og plantur vaksa eisini úr moldini og úr leirinum. Somuleiðis standmyndirnar hjá Hans Paula og mongum øðrum myndahøggarum.

Ein onnur stór standmynd, sum stendur uttan fyri Listaskálan. Niðast síggja vit listamannin Hans Paula. Hann situr niðri, vit síggja vælskaptu beinini og hann blundar og er í eini innanívendari meditativum sinnisstemningi. Hann hvílir í sær sjálvum og trívist í sínum einsemi. Aftan fyri hann síggja vit eitt stórt berg, sum er formað sum eitt yvirvaksið skuggabein og eina hond. Ovast uppi síggja vit ein lítlan figur, dynamikkurin millum lítla figurin ovast uppi og stóru sjálvsmyndina er einastandandi og somuleiðis tann ørandi hæddarkenslan. Eitt meistaraverk, sum inniheldur nógva djúpa psykologi og filosofi hjá menniskjanum.

### Krossfesting

Ein onnur stór standmynd, ið stendur uttan fyri Listaskálan, er um sjálvmorð sum eitt slag av krossfesting. Jesus varð krossfestur, men eisini tey fólkini, sum verða krossfest av nógvum mótgangi, líðingum og depressiónum og ikki orka at liva og taka seg av døgum, og øll tey, sum eru blóðfátøk og hungra, tey eru eisini krossfest av lívinum og tilveruni, men Hans Pauli hevur sagt mær, at henda standmynd eisini handlar um at offra seg fyri listini. Fleiri listafólk av øllum slagi hava tikið lívið av sær, eisini í Føroyum. Ein sera sterk standmynd.

Í fleiri av standmyndunum hjá Hans Paula hevur hann verið upptikin av skugganum, sum øll fólk hava ein av. Vendur tú tær vekk frá sólini, so sært tú bert tín egna skugga. Skuggin er symbol uppá deyðan og skuggin fylgir tær restina av lívinum. Skuggin symboliserar eisini undirgang, nevniliga at um man letur myrkrið í sálini fáa yvirvág, so gongur man til grundar, og tað gera nógv tíverri. Mong menniskju finna ikki kærleikan, tíverri.

### Brøðurnir

Hans Pauli hevur gjørt fleiri portrett og eitt tað besta er av yngra beiggjanum Mariusi. Hann er eisini sum áður nevnt ein stórur listamaður. Hetta er ein klókur maður, sum hevur lisið nógv um religión, filosofi, skaldskap, men hann er, sigur hann, ateistur. Hann hevur upplivað nógv og trívst best í skuggasíðuni í samfelagnum, og hann hevur livað eitt farligt lív. Eitt dapurt filosofiskt, mystiskt, men eisini eitt følsamt og árvakið úttrykk er í eygnabránum. Hann hevur eitt temperamentsfult og partvíst vanskiligt sinnalag, men hann hevur eisini fingið givið og fingið nógvan kærleika og er eisini brendur av líðingum og er harvið blivin djúpari sum listamaður og menniskja. Eitt sera væleydnað portrett.

Portrettbustan av bróðrinum Bjarna er eisini væleydnað og somuleiðis portrettbustin av Torbjørn. Hann er eitt tigandi, stilt og følsamt menniskja, men viðhvørt vaknar bjørnin í honum og ger ein temperamentsfullan vørr. Hann dyrkar sítt einsemi og livir í síni egnu listaverð. Og so er eitt portrett í tveimum, tað er Hans Pauli og konan Hjørdis. Hans Pauli hvílir sítt troytta, heldur dapra og álvarstunga høvd á bringuni á konuni Hjørdis. Tey síggja bæði eitt sindur forpínd út. Tey eru eitt sindur troytt eftir ein langan dag, har tey hava tænt listini í hvør sínum einsemi. Tey hava funnið hvønn annan, men eru kortini upptikin av at tæna listini í hvør sínum einsemi.

Ert tú einsamallur, so kemur tú at fáa stórt selskap umsíðir, skrivar ein svenskur yrkjari, og øll list, skaldskapur, tónleikur verður skapað úr einseminum.

Á eini aðrari standmynd síggja vit avprentið av nakna kroppinum hjá listamanninum.

### Fiduslist?

Ein onnur portrettmynd er av listamanninum og fyrrverandi savnsstjóranum í Listaskálanum, Bárður Jákupsson, sum hevur stuðlað mær og Olsen beiggjunum øgiliga væl. Hetta er ein klókur og vællisin maður. Hann hevur eina sterka psyko, hann sær álvarsligur út, men hann hevur verið í eitt sindur ringum lagi, tá ið Hans Pauli hevur avmyndað hann. Tað er heilt givið, at hesin maðurin hevur nógvar fíggindar og hann hatar fiduslist, tað geri eg eisini. Fleiri av teimum kendu væletableraðu listamonnunum í Føroyum eru fidusmenn, bert 10% av tí, sum verður skapt av list í Føroyum og aðrastaðni við, kemur at halda, ella er tað 1%, eg veit ikki rættiliga.

*Framhald á næstu síðu*